# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SKULDI TAÐ RØKKA ELLA STØKKA?

Tað var helst ov naivt at vænta sær, at stjórnarskipanarnevndin fór at koma til eina einmælta semju, nú arbeiðið í fyrst Grundlógarnevndini, seinni Stjórnarskipanarnevndini nærkast endanum og skal leggjast fyri tingið og seinni til fólkaatkvøðu.

Tó so hava fleiri glottar verið, tí tað sjáldsama er hent, at allir flokkar hava so at siga drigið somu línu í rættiliga stóran mun. Men tað skuldi kanska støkka – og tað var júst tað, sum hendi við breiðu semjuni. Fyrst boðaðu smáu flokkarnir frá, at teir ikki vildu vera við, og nú hevur Tjóðveldi sagt tað sama, tó at annað umboðið hjá Tjóðveldinum, tann pragmatiski tingmaðurin Sjúrður Skaale, er partur av meirilutanum, sum telur umboð úr fimm av sjey flokkum á tingi – og átta av 11 nevndarlimum.

Mótpartur hansara er Høgni Hoydal, sum gevur Lars Løkke Rasmussen skuldina, tí hann skal hava syndrað arbeiðið í nevndini.

Stríðið stendur um, at tað stendur í uppskotinum, at vit skulu virða sáttmálar og avtalur, sum eru gjørdar frammanundan – og soleiðis eisini heimastýrislógina.

Sambært Hans Paula Strøm, nevndarformanni, so er hetta júst ein orðing, sum var við í uppskotinum hjá upprunaligu Grundlógarnevndini.

Sjúrður Skaale sigur eisini í viðmerking í dag, at tað er beinleiðis skeivt, sum Høgni Hoydal segði í Degi og Viku í gjárkvøldið, at fulla semjan varð skeiklað, tí Lars Løkke Rasmussen legði uppí. Sambært Sjúrði Skaale, so var tað ikki var full semja um málið, tá tað varð lagt fram til viðgerðar í fjør. Ein flokkur boðaði greitt frá, at hann var ímóti, og fleiri nevndarlimir gjørdu greitt, at teir ynsktu ávísar broytingar gjørdar í víðari viðgerðini.

Tað er sera áhugavert, at umboðini hjá Tjóðveldi í stjórnarskipanarnevndini hava so ymsar hugsanir. Spurningurin er so bara, um Sjúður Skaale er við at mála seg inn í ein krók í Tjóðveldinum, eins og Jákup í Jákupsstovu gjørdi í Javnaðarflokkinum í 1946, ella um partar av Tjóðveldinum veruliga vilja hava eina pragmatiska loysn á hesum máli, sum hevur órógv-



að føroyskan politikk í væl meiri enn hundrað ár.

Eyðsæð er, at Tjóðveldi – um flokkurin vil hava ávirkan í føroyskum politikki – má flyta seg og føra pragmatiskan politikk. Flokkurin hevur seinastu 13 árini verið ein av teimum stóru flokkunum. Men Høgni Hoydal og hansara vongur má síggja í eyguni, at loysingarsinnaði parturin av føroyingum so at siga bara er at finna í veljarafjøldini hjá Tjóðveldinum.

Politikararnir skylda fólkinum eina loysn, sum skal røkka. Fáið tí hetta málið avgreitt og til fólkaatkvøðu sum skjótast. Okkum nýtist ikki politikarar at tulka støðuna hjá fólkinum. Tí tá fólkið hevur talað, so vita vit, hvat fólkið í Føroyum í dag heldur um ríkisrættarligu støðuna!

**Latið fólkið siga sína hugsan um loysing ella samband**

## Marjus vil heldur vera lækni

Marjus Dam, tingmaður fyri Sambandsflokkin, boðaði í gjár frá, at hann ikki stillar uppaftur til næsta løgtingsval. Orsøkin er, at hann fer at røkja kommunulæknastarvið, sum hann hevur aftur at tingarbeiðinum, fulla tíð.

Marjus Dam varð fyrstu ferð valdur á ting í 1998. Hann varð afturvaldur í 2002 og í 2004, men fall í 2008. Hann hevur kortini havt sæti á tingi, síðani ABC samgongan varð skipað í september 2008 sum varamaður.

Tá vágafólk sendu síni uppskot til listan hjá Sambandsflokkinum, tá varð Marjus Dam teirra umboð. Uppstillingarfundurin í Vágum vrakaði Rósu Samuelsen, sum kortini kom upp á listan gjøgnum sambandsfelagið í Havn. Rósa Samuelsen varð vald á ting, meðan Marjus fall. Kortini fekk Marjus Dam sæti á tingi, tá Rósa Samuelsen fór í landsstýrið. Lagnunnar speisemi, kundu vit sagt...

Marjus Dam vísir í skrivi til miðlarnar á ymiskt gott, sum er hent hesi árini, hann hevur verið á tingi - og á ymiskt ringt. Tað allar ringasta heldur hann vera, at løgtingið hevur kastað fýra milliardir krónur aftur til Danmarkar - pengar, sum Marjus Dam heldur kundu verið nýttir innan skúla og sosiala økið og skapt varandi loysnir.



## Seks finna sjálvi hurðina

Áðrenn Marjus Dam boðiði frá, at hann ikki stillar uppaftur, hava onnur tingfólk boðað frá tí sama.

Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi hevur boðað frá, at hann ikki stillar uppaftur. Hann er vorðin havnarfúti í Rúnavíkar Havn - og hann gevst í politikki. Hann kom fyrstu ferð á ting sum varamaður fyri Signar á Brúnni, tá fullveldissamgongan varð skipað í mai 1998.

Anfinn Kallsberg hevur sagt tingsessin frá sær, og hann stillar ikki uppaftur. hann hevur sitið á tingið síðani løgtingsvalið í 1980.

Jóannes Eidesgaard hevur eisini boðað frá, at hann ikki stillar upp. Hann hevur verið valdur á ting síðani valið í 1990.

Andreas Petersen hevur eisini boðað frá, at hann ikki stillar upp, hann varð valdur á ting í 2002 og afturvaldur í 2004. Hann fall á valinum í 2008, men hevur sæti sum varamaður.

Katrin Dahl Jakobsen stillar heldur ikki uppaftur. Hon varð fyrstu ferð vald í 1998. Honn fall í 2002, men varð afturvald í 2008.



**Snýr seg ikki um persónar**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 12



**Tunnilin stórt framstig**

ANNIKA OLSEN
KJAK Á SÍÐU 15

## Jenis skulkar hvønn fund



Stjórnarskipanarnevndin, sum nú tykist vera komin undir land við álitinum um stjórnarskipan Føroya, hevur havt 12 fundir í ár. Av hesum hevur løgtingsmaðurin Jenis av Rana útmerkað seg við at vera burturstaddur hvønn tann einasta fund.

Honum á baki at møta illa upp koma Kári á Rógvi, formaður Sjálvstýrisflokksins og Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum, sum ikki hava møtt á fimm fundum.

Tosað hevur verið um breiða semju, men hon fæst valla, tá menn ikki møta til arbeiðis

## Setrið kunnar í Miðlahúsinum

Fróðskaparsetur Føroya hevur mikukvøldið kunningartiltak í Miðlahúsinum.

Um ein lítlan mánað, tann 1. juni, er freistin at søkja inn á Fróðskaparsetur Føroya í ár, og í tí sambandi hevur Setrið kunningartiltak í Miðlahúsinum mikukvøldið kl. 19.30. Har verður møguleiki at fáa nærri innlit í tær útbúgvingar, sum Setrið bjóðar út til lesandi. Umboð fyri allar útbúgvingarnar fara at siga frá og møguleiki verður fyri at seta spurningar. Føroya Læraraskúli, Sjúkraróktarfrøðiskúli Føroya og Søgu- og Samfelagsdeildin taka nýggj lesandi inn til bachelorlestur á hvørjum ári. Føroyamálsdeildin tekur nýggj lesandi til bæði hjánám í føroyskum og BA lestur í føroyskum í 2011. Náttúruvísindadeildin tekur nýggj lesandi inn til bachelorlestur annaðhvørt ár. Árið 2011 verður ikki tikið upp á Náttúruvísindadeildini. Umframt kunningina um lesnað á Setrinum fer Guðrið Hansdóttir eisini at syngja og spæla. Rás2 sendir beinleiðis frá tiltakinum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*